# 3 STØRV
## á Føroya Skúlabókagrunni

### Ritstjóri á Skúlabókagrunninum

**Eitt starv sum ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni innan miðnámsskúlaøkið verður lýst leyst til setanar, so skjótt sum til ber.**

**Praktiskt útgávuvirksemi**

Starvið, sum talan er um, fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi innan øll fakøki til miðnámsskúlan eins og ráðgeving og vegleiðing í hesum sambandi. Vilt tú vera við til at menna miðnámsskúlaøkið og tryggja, at lærarar og næmingar hava góðar undirvísingarmiðlar, so eru nógvar áhugaverdar uppgávur at fara í holt við á Skúlabókagrunninum.

**Førleikar**

Til starvið krevst útbúgving sum miðnámsskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir og dyggur fakligur førleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

**Løn og setanartreytir**

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 14. juli 2008.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Niels Petersen, tlf. 31 61 00.

### Avloysari fyri ritstjóra

**Tíðaravmarkað starv fyri ritstjóra í barnsburðarfarloyvi verður lýst leyst til setanar frá 15. oktober 2008 til 31. juli 2009. Ritstjórastarvið fevnir um fólkaskúlaøkið.**

**Praktiskt útgávuvirksemi**

Hetta starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi innan allar lærugreinir í fólkaskúlanum eins og ráðgeving og vegleiðing í hesum sambandi.

Ætlanin er, at ritstjórin skal arbeiða við útgávum innan kunningarlærugreinirnar í fólkaskúlanum. Tað eru søga, samfelagslæra, landalæra, lívfrøði o.s.fr. Eisini í lærugreinunum kristni, føroyskum og fremmandum máli er tørvur á nýggjum undirvísingarmiðlum, og kunnu uppgávur á hesum økjum koma fyri. Vilt tú vera við til at menna fólkaskúlan og tryggja, at lærarar og næmingar hava góðar undirvísingarmiðlar, so eru nógvar áhugaverdar uppgávur at fara í holt við á Skúlabókagrunninum.

**Førleikar**

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir og dyggur fakligur førleiki innan tey fakøki, sum ritstjórin fer at arbeiða mest við, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

**Løn og setanartreytir**

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag í lønarflokki 30.1 og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 14. juli 2008.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Niels Petersen, tlf. 316100.

*...útvega dygdargóðar føroyskar undirvísingarmiðlar...*

